# Heimahjálparar væl nøgdir við nýggja sáttmálan

Heimahjálparar kunnu ikki annað enn vera væl nøgdar við nýggja tveyára sáttmálan, sum um vikuskiftið varð gjørdur við landsstýrið. Heimahjálparafelagið fekk so at siga øll krøvini ígjøgnum.

SNORRI BREND

Eftir at hava samráðst í ikki meiri enn fimm tímar seinasta fríggjakvøld, komu samráðingarumboðini fyri landsstýrið og Heimahjálparafelagið til semju um henda nýggja sáttmálan, sum er í gildi til 1. juni '99.

Seinnapartin dagin eftir varð so semjan undirskrivað, sum m.a. gevur heimahjálparunum øktar viðbøtur. Eisini stendur, at arbeiðið skal skipast uttan brot í arbeiðstíðini har tað ber til, og at lønin skal hækka til sama støði, hon var á fyri fimm árum síðani.

Í nýggja sáttmálanum verða, umframt sunnu- og halgidagar hesir dagar roknaðir sum serstakir frídagar: Jólaaftan, páskaaftan, flaggdagur, 1. mai og ólavsøkudagur. Aftaná kl. 12 verða hesir dagar roknaðir sum serstakir frídagar: Hvítusunnuaftan, grundlógardagur, ólavsøkuaftan og allahalgannadagur.

Men tað kravið sum stóð ovast á listanum hjá felagnum, varð so sanniliga eisini gingið á møti. Heimahjálparafelagið ynskti nevniliga eina skipan við eftirlønini, soleiðis at henda frá 1. januar '99 verður samanlagt 2,65% av grundlønini.

Í Heimahjálparafelagnum eru 350. Forkvinnan í felagnum, Ása Djurhuus er sera fegin um sáttmálan:

– Samráðingarnar byrjaðu fríggjakvøldið kl. 17 og endaðu kl. 22. Tær gingu avbera væl, og vit eru sera væl nøgdar við nýggja sáttmálan, har vit so at siga fingu øll okkara krøv við, sigur hon.

### Fáa nú eftirløn

Millum limirnar í Heimahjálparafelagnum hevur leingi valdað ónøgd við at eingin skipan var við eftirlønini. Tí hevur verið heitt á nevndina um at fáa hetta við í ein nýggjan sáttmála.

Hetta kravið varð tí fyrst av øllum tikið fram í samráðingunum, og frá ársskiftinum verður 1% av grundlønini goldið til eftirlønina, frá 1. juli næsta ár 0,85% og frá 1. januar '99 0,8%.

Í semjuni verður sagt, at felagið og landsstýrið skulu í felag góðkenna eftirlønarskipanina. Eftirlønargjøldini verða flutt á bundna konto hjá felagnum, inntil eftirlønarskipanin er góðkend av landsstýrinum og felagnum.

Í samband við samráðingarnar um hesar viðbóturnar, valdi felagið at taka ein part av teimum til eftirlønirnar. Tí eru viðbøturnar ikki komnar fult upp enn.

### Viðbøturnar hækka

Eitt annað av ynskjum felagsins var at fáa hækkingar av viðbótunum fyri arbeiði uttan fyri vanligar arbeiðstíðir. Hetta fekk felagið somuleiðis við í sáttmálan.

Hetta førir við sær, at viðbótin fyri arbeiðið millum kl. 17 og 23 hækkar úr 10,80 til 14,05 um tímar. Viðbótin fyri arbeiði leygardagar millum kl. 12 og 23, og fyri arbeiði leygardagar áðrenn kl. 12 á vaktum, har meiri enn helmingun av arbeiðstímunum er aftaná kl. 12, er hækkað úr 14,40 upp í 18,70.

Haraftrat fáa heimahjálpararnir hereftir 20 min. eyka fyri hvønn arbeiðstíma sunnu- og halgidagar og serstakar frídagar. Frammanundan vórðu lætnir 15 min. eyka.

Heimahjálpararnir fáa somuleiðis meiri í løn. Í sáttmálanum verður sagt, at frá 1. januar '99 hækkar lønin upp á sama støði sum hon var í '92.

### Uppskúling og endurútbúgving

Í innganginum til sáttmálan verður greitt frá, at hesin sáttmálin fevnir fyrst og fremst um heimahjálpararnar, men fevnir haraftrat um almanna- og heilsuhjálparar, sum starvast innan Heimarøktina.

Sagt verður, at byrjunarlønin fyri almanna- og heilsuhjálparar verður á 4. stigi, og at heimahjálparar, sum nema sær hesa útbúgving og arbeiða í Heimarøkini, ikki missa starvsaldur sum heimahjálparar.

Í serstøkum protokollati eru partarnir tí samdir um at berast skal so í bandi, at limirnir í felagnum skulu hava rætt at fáa uppskúling og endurútbúgvig til almanna- og heilsuhjálparar, tá henda útbúgvingin verður sett á stovn í Føroyum.



Arbeiðið hjá heimahjálparunum er fjølbroytt og mangan strævið. Undir samráðingunum við landsstýrið hava tær fingið so at siga øll krøv síni ígjøgnum, m.a. spurningin um eftirlønina (Savnsmynd)

Verður henda útbúgvingin sett á stovn í Føroyum, verður talan um eina nýskapan í stórum mátistokki. Forkvinnan í felagnum, Ása Djurhuus hevur sjálv sitið í eini nevnd, sum hevur fyrireikað hesa útbúgvingina.

Nevndin hevur handað landsstýrinum sítt uppskot til eina slíka útbúgving. Og vísir landsstýrið málinum vælvild, so talar alt fyri at henda útbúgvingin kann byrja longu komandi summar.

## Klaksvík: Fiskivinnan má ikki glíða í oljuni

– Einki er at ivast í, at oljuvinnan fer at broyta okkara samfelag munandi. Men vit skulu alla tíðina hava í huga, at hetta verður neyvan ein vinna, sum øll ættarlið í Føroyum eftir okkum, fara at kunna liva av.

SNORRI BREND

Norðlýsið viðgerð í oddagrein fríggjadagin málið um oljuna og oljuhavnirnar, nú tað skilst, at Klaksvíkin eisini fer at spenna seg út í samband við hesa komandi vinnuna hjá føroyingum.

Spurt verður, um ein ikki júst nú átti at lagt doyðin á at betra um fiskivinnuumstøðurnar í Klaksvík.

– Vit hava eina stóra og virðismikla vitan á hesum økinum í løtuni, og kanska kunnu vit skaða hetta aktiv okkara, um vit frá byrjanini leggja alt ov stóran dent á oljuvinnuna.

– Tað er í hvussu so er umráðandi, at vit ikki gloyma fiskivinnuna, nú alt er á gosi um oljuna og oljumilliónirnar, skrivar Norðlýsið.

### Standa saman

Oddagreinsskrivarin í Norðlýsinum vísir á, at fleiri kommunur hava havt følarar úti, og hava roynt at gjørt vart við seg sum vælegnaðar oljuhavnir.

Sagt hevur verið, at best er um vit standa saman at koma við tilboðum til oljufeløgini, og at kommunurnar eiga at ganga saman um, hvør av teimum skal fáa hvat burtur úr hesi nýggju vinnuni.

– Hetta er helst ein rættur tanki, men higartil hevur verið sera ringt at samskipa nakað sum helst um kommunumørk, skrivar Norðlýsið, og vísir til torføra burðin hjá brennistøðini í Leirvík, sum eisini var eitt felagskommunalt tiltak.

Klaksvíkar kommuna hevur heldur ikki ligið á løtu síðuni, tá talan hevur verið um oljuvinnuna. Hóast lítið er komið fram um hetta, so skilst á blaðnum, at kósin er løgd eftir oljuvinnuni.

Men oddagreinsskrivarin ynskir at ávara um ikki at leypa framav, soleiðis at ein ikki í øllum hesum gloymir fiskivinnuna, sum hevur størstan týdning fyri Klaksvíkina.

Tí, sum sagt verður: »Oljuvinnan er neyvan ein vinna, sum komandi ættarlið fara at kunna liva av«.

